## Sagex tímir heldur ikki

Sagex Petroleum og Lindir Exploration hava nú tikið aftur felags umsóknina um at sleppa at leita eftir olju og gassi á Drekaleiðini, sum er í landnyrðingnorðan úr Íslandi. Fyrr í summar tók Aker Exploration eisini sína umsókn aftur, so nú er eingin umsókn eftir á borðinum hjá Orkustovninum í Reykjavík. Freistin at søkja um leitiloyvi á Drekaleiðini var úti tann 15. mai, og Aker Exploration, Sagex Petroleum og Lindir Exploration vóru einastu umsøkjarar, tó soleiðis at tey bæði seinnu søktu í felag. Orkustovnurin sigur, at soleiðis sum støðan er, verður einki leitingarloyvi latið í hesum árinum.



## Stríð um mjólk

Um fjúrtan dagar hittast landbúnaðarmálaráðharrarnir í ES-londunum í Bruxelles at tosa um kravið frá bóndrunum, sum vilja hava meiri fyri mjólkina. Fíggjarkreppan hevur gjørt, at fólk keypa ikki so nógva mjólk nú sum fyrr, og tað hevur trýst mjólkarprísin langt niður. Tað vilja bóndurnir ikki góðtaka, og sum lið í mótmælinum hava teir stoytt fleiri milliónir litrar av mjólk burtur í seinastuni. Samstundis nokta aðrir bøndur at lata mjólkarvirkjunum mjólk, og tann avgerðin stendur við, til bóndurnir hava fingið politiskt lyfti um betri prís.

# Høgni á donskum

**Føroyskan tónleik, føroyskar bjór og føroyska presissheit. Hetta sluppu danir at royna á Jolene barr í Keypmannahavn í týskvøldið, tá Høgni hevði útgávukonsert**



*Í gjárkvøldi sluppu danir at uppliva orkumikla Høgna og í næstum verður tað íslendingar*

TÓNLEIKUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*
*Mynd: Rólant Waag Dam*

Ein lítlan tíma ella so mundi konsertin vera seinkað, men tá Høgni endiliga fór í gongd, var ikki so nógv roks. Ongir umskyldningar ella undanførslur. Nei, soleiðis var tað bara og so koyrdi hann og bólkurin á.

Ei heldur tosaði høvuðspersónurin nógv sjálvur millum sangirnar. Hann takkaði tó fyri, at so mong – og tað vóru nógv fólk – vóru komin at lurta. Burtursæð frá hesum var tað ikki nógv, ið hoyrdist til Høgna millum sangirnar. Sjálvandi ber til at lata tónleikin tala, men til eina útgávukonsert hoyra onkursvegna frágreiðingar til um ymsu sangirnar og hvussu fløgan hevur tikið skap.

Lagið Burstin' Bubble er skrivað um fíggjarkreppuna og hesum greiddi Høgni eisini frá, men tað skuldi verið fleiri frágreiðingar av hesum slagnum, eins og Høgni áður hevur greitt frá á konsertum sínum. Tí hóast størsti parturin av áhoyrarafjøldini mundi telja føroyingar, so er tað ikki víst at donsku áhoyrararnir kenna samanhangin og søguna aftanfyri fløguna og einstaka sangin.

### Orkan skal út

Hinvegin minnast teir helst framførsluna, Høgni hevði týskvøldið. Hóast hon ikki taldist millum tær allarbestu hjá Høgna, so var hon góð og eigur Høgni rós og heiður uppiborið fyri – saman við hinum báðum í bólkinum – at megna at skapa eina so rúgvusmikla og umfatandi ljóðmynd. Somuleiðis er tað altíð stuttligt at eygleiða Høgna á pallinum, tí hansara alskur til tónleikin lýsir av honum.

– Mær dámar væl at upptraðka við gittara, men tað er minni fysiskt enn at spæla trummur, sum tú kanst smildra sundur. Tað kanst tú ikki við einum gittara, og tá eg so heldur ikki dansi vanligt so smittar tað kanska á framførsluna, har eg má fáa orkuna út á onkran hátt, fortelur Høgni, tá hann skal greiða frá sínum ógvuliga livandi framførsluhátti.

Tey næstu, sum fáa gleðina av at hoyra og uppliva Høgna eru íslendingar. 14. oktober skal hann og bólkurin spæla á Iceland Airwaves, har Høgni áður hevur spælt sum einstaklingur.

– Nú verður tað við bólki, at eg fari at royna meg, sigur Høgni og vísir samstundis á, at bólkurin ikki telur fleiri enn teir tríggjar, ið spældu týskvøldið. Høvuðsorsøkin til, at bólkurin ikki telur fleiri fólk er fíggjarlig.

– Tað loysir seg ikki økonomiskt at vera meir enn ein trio, tá tú ferðast runt við tónleikinum, sigur Høgni, sum harvið ikki vil spreingja bløðruna, hann sjálvur syngur um.

### Fløga í fýra londum

Høgni hevur fyrr í ár havt útgávukonsert í Føroyum. Týskvøldið hevði hann útgávukonsert í Danmark, men harumframt hevur hann eisini útgivið fløguna í Íslandi og Noreg.

Hetta er ein marknaður, tað ikki er lætt at koma inn í, ásannar Høgni.

– Tað er sera trupult at koma inn á Skandinaviska marknaðin. Tey hava nokk við at hoyra sín egna tónleik, og tað sum verður innflutt aðrastaðni frá, eru tey heilt, heilt stóru nøvnini, sigur Høgni, sum kortini ikki metir tað vera vónleyst, nú hann hevur útgivið fløguna í fýra av Norðurlondunum.



*Rættiliga nógv fólk vóru á Jolene í gjárkvøldi – størsti parturin taldi tó føroyingar*